## Landbúnaðarjørð missir virðið

Ein av avleiðingunum av altjóða fíggjarkreppuni er, at virðið á landnúnaðarjørð er minkað munandi teir seinastu mánaðirnar. Hetta er millum annað galdandi í Danmark. Jyllands-Posten skrivar, at fyri einum ári síðani kostaði ein hektar av landbúnaðarjørð 258.000 krónur í meðal, men at í dag er prísurin farin niður um 200.000 krónur. Tað merkir sambært blaðnum, at virðið á landbúnaðarjørðini í Danmark er minkað 156 milliardir krónur, og tað ger, at nógvir bøndur hava ilt við at fáa fígging til raksturin, tí virðið á ognini er vorðið minni enn skuldin.



## Best at búgva í Svøríki

Skuldu norðurlendingar valt at flyta til onnur Norðurlond, høvdu teu flestu valt at fara til Svøríkis. Tað er niðurstøðan í einari kanning, sum umfatar Ísland, Noreg, Danmark, Svøríki og Finnland. Eitt nú siga 51 prosent av teimum spurdu dønunum, at teir høvdu búsett seg í Svøríki, um teir skuldu valt, og 49 prosent av teimum spurdu sviunum siga, at teir høvdu valt Noreg. Ísland og Finnland høvdu harafturímóti ikki fingið nógvar tilflytarar. Bara trý prosent av dønunum, tvey prosent av norðmonnunum og eitt prosent av sviunum høvdu valt Ísland, og tey siga á leið tað sama um Finnland.

# Vit lata kreppurnar stýra okkum

**Tórbjørn Jacobsen, fíggjarnevndarlimur fyri Tjóðveldi, sóknast eftir politiskum dirvi til at tálma útreiðslunum. – Vit mugu spara, men eingin hevur dirvið til at tálma útreiðslunum. Tað eru tær afturvendandi kreppurnar og danir, sum stýra okkum, sigur hann**

SAMFELAGS-BÚSKAPUR

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Stendur tað til Tórbjørn Jacobsen, skulu føroyingar ikki sita og bíða eftir at kreppan noyðir okkum at leika næsta leikin. – Fíggjarlógin er full av gomlum syndum, sum ger, at eingin hevur dirvið at gera nakað sum helst, og tí stýra kreppurnar okkum, slær næstformaðurin í Tjóðveldi fast*

Skal vælferðarsamfelagið haldast uppi, skulu stórar broytingar gerast. Útreiðslurnar vaksa nógv for skjótt og eingin hevur neyðuga dirvið til at tálma útreiðslunum. Tað heldur Tórbjørn Jacobsen, ið umboðar Tjóðveldi í fíggjarnevnd Løgtingsins.

Hann sóknast eftir at loysnirnar verða lagdar á borðið, tí gongdin má broytast í stundini.

- Føroyingar hava útmerkað seg seinastu árini við at útreiðslusíðan á fíggjarlógini er vaksin við 8 til 11 prosentum um árið. Útreiðslurnar vaksa nógv for skjótt, og tað er hetta sum ger at vit vera verandi inni í hesari áhaldandi kreppuni. Men eingin hevur dirvið til at tálma hesum útreiðslunum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

### Fíggjarlógin full av gomlum syndum

Sambært Tórbirni Jacobsen er tað gjørligt at minka um útreiðslurnar á verandi fíggjarlóg út við 200 milliónir krónur, bert neyðugu bygnaðarligu broytingarnar verða gjørdar.

- Tá vit í desember gjørdu verandi fíggjarlóg, gingu vit inn í eina semju fyri at fáa sum frægast burturúr. Men tá hevði Tjóðveldi sítt egna minnilutaálit, har vit eisini vístu á fleiri bygnaðarligar broytingar. Við teimum átøkum kunnu vit minka um hallið út við 200 milliónum krónum, vísir hann á.

Millum stóru postarnar, ið Tjóðveldi í álitinum vísir á, kunnu nevnast sjómansfrádrátturin, ið skal geva 60 milliónir, grønur skattur á bensin og diesel, 25 milliónir, hægri inntøkuskatt á hægru inntøkurnar, 40 milliónir, minstalønin hjá fiskimonnum flytast til arbeiðsmarknaðin, 28 milliónir, og broytingar í rentustuðulinum á 11 milliónir, umframt fleiri aðrar minni postar, ið tilsamans renna seg upp á 242 milliónir krónur.

- Fíggjarlógin er full av gomlum syndum, so sum minstalønin og rentustuðulin. Har eru allir møguligir lepar, sum hanga eftir frá eini tíð, ið langsíðan er farin. Men eingin